# Byggja sín egna

**BÁTASMÍÐ** Tað var tann tíð, tá eitt skip fyri og annað eftir fór av bakkastokki á Skála Skipasmiðju. Soleiðis er ikki longur, nú nógv ár eru liðin síðani seinasta nýbygningin. Men seinni í ár verður kortini ein bátur sjósettur av skipasmiðjuni - ein útróðrarbátur við navninum Sjóbjørnin

Tekstur: Snorri Brend
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Skála:** - Vit byrjaðu í november mánaði, men tað sæst ikki so nógv eftir.

- Men eg vil tó siga, at tað drúgvasta arbeiðið er longu gjørt, sigur Oluf Johannesen á Skála

Saman við tveimum øðrum, John Høj og John Johannesen, hevur hann sett sær fyri at halda lív í føroyskum skipasmíði - og tað á staðnum, har skip í hópatali eru bygd.

Her á teirri fyrrverandi Skála Skipasmiðju, men sum nú ber heitið MEST, eru teir farnir undir at byggja sín egna bát. Hóast báturin skal ganga rímiliga skjótt, er talan tó ikki um ein vanligan speed-bát.

- Tá tilfarið kemur, fara vit av álvara í gongd aftur, siga teir báðir Oluf Johannesen og John Høj.

### Í sving

Teir tríggir røsku og virkishugaðu dreingirnir hava havt sína dagligu gongd her á skipasmiðjuni tey seinnu árini.

Hjá Olufi og John sæst nú eisini ein endi á lærutíðini. Men áðrenn ta tíð, er ætlanin at tað stóra sveinastykkið skal fáast frá hond og sjósetast: Útróðrarbáturin, sum teir so leingi hava droymt um.

Júst hví teir fóru undir hesa verkætlanina, duga teir ikki heilt nágreiniliga at siga frá. Hetta er uttan iva ein samanrenning av áhuga fyri skipasmíði, og ein stórur hugur

» Vit hava bílagt tað, men tað er bara ikki komið enn. Tí mugu vit bara bíða og bíða eftir tilfarinum, og TAÐ er rættiliga óinteressant



**SJÓSETING**
*Enn sær skrokkurin ikki út av nógvum, men seinni í ár er ætlanin at hesin fyrsti nýbygningurin í longri tíð, skal sjósetast. - Hetta verður ein spennandi dagur, siga teir báðir, Oluf Johannesen (fremst á myndini) og John Høj*

at skapa og útinna eitt stórverk við egnum hondum.

- Vit tríggir snakkaðu um hetta í eina tíð. Og so, - ja, so fóru vit bara í sving, greiðir Oluf frá.

Ætlanin hjá teimum trimum vinmonnunum er at útgerða bátin soleiðis, at teir kunnu fiska við honum.

- Tað er ikki meiri enn tað, siga teir.

### Drev

Eftir at hava tosað saman í eina tíð, varð kjølurin á bátinum lagdur í november mánaði í fjør.

"Kjølur", er ov nógv sagt, tí báturin hevur í roynd og veru ikki kjøl, men er flatbotnaður. Hann hevur drev at dríva bátin fram við, eins og myndin av íslendska modellinum hevur.

Ætlan teirra er at innrætta bátin soleiðis, at teir eisini skulu kunna